# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Nú er stundin komin. Afrikanskir leiðarar mugu taka stig til at fáa Robert Mugabe frá*
*Raila Odinga, forsætisráðharri í Kenya*

# Fyrst fekk hon 10 ára fongsul - nú skal hon sita 10 ár afturat

**Ein dómstólur í Turkalandi sigur, at kurdiska mannaræ ttindastríðskvinna n Leyla Zana skal í fongsul tíggju ár afturat**

Sambært rættinum hevur Leyla Zana brotið lógina, tí hon í níggju førum óbeinleiðis hevur sagt seg stuðlað kurdiska flokkinum PKK, sum er ólógligur í Turkalandi, og floksins leiðara Abdullah Öcalan, sum situr í fongsli.

Dómurin fall í gjár, og har bleiv Leyla Zana dømd 10 ára fongsul. Verji hennara sigur, at málið verður lagt fyri hægri rætt.

Tann 47 ára gamla manna rættindastríðskvinnan hevur longu sitið 10 ár í fongsli, tí hon sambært rættinum hevði samstarvað við PKK. Nú skal so í fongsul 10 ár afturat, um dómurin ikki verður broyttur.



Leyla Zana hevur fingið fleiri heiðurslønir fyri sítt arbeiði fyri mannarættindum. Eitt nú hevur hon fingið Sakharov-heiðurslønina frá ES, og fyri tveimum árum síðani fekk hon ta norsku Rafto-heiðurslønina fyri arbeiði sítt.

*Leyla Zana hevur fingið fleiri heiðurslønir*
*Mynd: Scanpix*

## STUTT SAGT

### Dømd fyri burturflyting

Ein bretskur dómstólur dømdi í gjár ta 33 ára gomlu Karen Matthews seka í at hava medvirkað til at burturflyta sína egnu dóttir við tí fyri eyga at fáa finningarløn aftaná. Tann 40 ára gamli Michael Donovan bleiv dømdur fyri at vera samsekur í málinum, tí tað var hann, sum fjaldi gentuna heima í húsum sínum.

Tað var í februar, at bretska løgreglan fekk at vita, at tann níggju ára gamla Shannon Matthews var horvin. Løgreglan fekk tó illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt við fráboðanini, og tríggjar vikur seinni fann løgreglan gentuna.

Tað vísti seg, at mamman og maðurin, sum gentan var hjá, høvdu ætlað sær at fáa 50.000 bretsk pund í finningarløn fyri gentuna.



*Karen Matthews burturflutti sína egnu dóttir*
*Mynd: Reuters*

### Umhugsar endurgjaldskrav

Í Teilandi umhugsar flogfelagið Thai Airways, um tað skal krevja endurgjald fyri fíggjarliga missin, sum felagið hevur havt av, at mótmælisfólk forðaðu allari flúgving til og úr Bangkok í fleiri dagar.

Thai Airways noyddist at avlýsa umleið 1.000 flogferðir, og hildið verður, at mótmælistiltakið hevur kostað felagnum einar fýra milliardir krónur. Sambært AP umhugsar leiðslan nú at senda teimum, sum skipaðu fyri mótmælistiltakinum, rokningina.

Flogferðslan til og úr Bangkok kemur ikki í rættlag fyrr enn í morgin.

### Fleiri fátæk í Oslo

Feløg og stovnar, sum royna at hjálpa teimum fátæku í norska høvuðsstaðnum Oslo, siga, at talið á teimum, sum hava tørv á mati og øðrum til gerandisdagin, veksur í hvørjum. Blaðið Aftenposten skrivar, at hvørja viku standa umleið 700 fólk í bíðirøð eftir at fáa mat og aðra hjálp. Tom Lund Georgsen, ið arbeiðir hjá einum hjálparfelagsskapi, sigur við blaðið, at tað er ógvuliga týðiligt, at gjógvin millum rík og fátæk í Noregi gerst altsamt breiðari.

# Koyrdi tingið til hús fyri at sleppa undan misáliti

**Kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, hevur forðað fyri einari atkvøðugreiðslu um misálit, sum hevði koyrt hann og stjórn hansara frá**



*Stephen Harper verður ikki frákoyrdur fyribils*
*Mynd: Polfoto*

Eftir dagsskránni hjá kanadiska tjóðartinginum fyri tingfundin mánadagin skuldi tingið atkvøða um eitt uppskot um misálit á forsætisráðharran og stjórnina. Men við einum óvanligum stigi hevur Stephen Harper, forsætisráðharri, fingið generalguvernørin at senda tjóðartingið til hús við boðum um at koma aftur á fund tann 26. januar.

Kanadiska stjórnin er minnilutastjórn, og 163 av teimum 308 tinglimunum høvdu boðað frá, at teir fóru at taka undir við uppskotinum um misálit. Teir tríggir andstøðuflokkarnir halda ikki, at stjórnin kann halda fram, tí hon hevur ikki megnað at leggja eina ætlan um, hvussu tað almenna skal loysa avleiðingarnar av fíggjarkreppuni.

Sjálvur sigur Stephen Harper, at hann hevur biðið generalguvernørin senda tingið til hús, so bæði stjórnin og andstøðan kunnu fáa betri stundir til at hugsa um, hvat skal gerast í sambandi við fíggjarkreppuna.

Stephen Harper er ikki tann fyrsti kanadiski forsætisráðharrin, sum hevur brúkt heimildina at biðja generalguvernørin senda tingið til hús, men politiskir eygleiðarar vísa, at hetta er fyrstu ferð, at tingið er sent tilhús, fyri at forsætisráðharrin skal sleppa undan misáliti.

- Hetta er ongantíð hent fyrr í Kanada og neyvan heldur í nøkrum landi í bretska samveldinum, sigur stýriskipanarserfrøðingurin Ned Franks við BBC.